# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK
TLF 341800

*»Ger Ísrael innrás, fer libanski stjórnarherurin at verja landið«*

*libanski verjumálaráðharrin*

**STUTT SAGT**

## Bush fríggjar til tey svørtu

Fyri fyrstu ferð hevur amerikanski forsetin, George W. Bush, vitjað ein av teimum svørtu borgararættindafelagsskapunum í USA.

AP skrivar, at tað var týðiligt, at endamálið við vitjanini var ein roynd at fáa betri samband við teir svørtu veljararnar, sum vanliga velja demokratarnar. Bush helt, at republikanski flokkurin hevur lagt ov lítlan dent á teir svørtu veljararnar - ikki bara nú, men í mong ár.

-Í mínum eygum er tað ein vanlukka, at tann gamli flokkurin hjá Abraham Lincoln kvetti sambandið við tað afroamerikanska fólkið, segði Bush, sum bleiv dúgliga fagnaður fyri orðini.

*George W. Bush.*



## Trý tikin fyri bumbuatsókn

Í India hevur løgreglan tikið tríggjar menn, sum sambært løgregluni høvdu samband við bumbuatsóknina at jarnbreytarkervinum í stórbýnum Mumbai tann 11. juli, har meiri enn 200 fólk lótu lív. Tveir av monnunum vórðu tiknir í landspartinum Bihar har norðuri í landinum í gjárkvøldið, og tann triði varð tikin í Mumbai tíðliga í morgun.

Fleiri hundrað onnur eru tikin í sambandi við atsóknina, men tey flestu eru latin leys aftan á avhoyringar, skrivar Reuters. Teir tríggir menninir eru tí tey einastu, sum formliga eru handtikin, sigur løgreglan.

207 fólk doyðu, og meiri enn 800 fingu skaða, tá sjey bumbur brustu í fleiri fullsettum tokum í Mumbai.

## Ísrael ger ov nógv av



*Kjell Magne Bondevik.*

Fyrrverandi norski forsætisráðharrin Kjell Magne Bondevik sigur seg vera ein av vinum Ísraels, men hann kann kortini ikki taka undir við tí, sum Ísrael nú ger í Libanon, sigur hann.

-Mínir bestu vinir eru teir, sum tora at gera vart við seg, tá teir halda, at eg geri eitt mistak. Tað haldi eg, at Ísrael ger nú, sigur Bondevik við Aftenposten. Hann leggur afturat, at tað, sum hendir í Libanon nú, fer at seta støðuna í økinum fleiri ár aftur í tíðina.

-Tað er harmiligt, og eg haldi, at Ísrael ger ov nógv av, sigur Kjell Magne Bondevik, sum sigur seg taka undir við stjórnini í Oslo, sum eisini hevur funnist at ísraelsku framferðini í Libanon og kravt, at partarnmir semjast um at binda frið.

# Hótta við at víðka álopið



*Ísraelsku loftálopini hava gjørt sera stóran skaða í Libanon. Hendan myndin er úr syðra parti av høvuðsstaðnum Beirut, har Hizbollah hevur nógvar viðhaldsmenn.*

**Ísrael hóttir við at víðka álopini á Libanon, og libanski herurin hóttir við at hjálpa Hizbollah ímóti ísraelsmonnum.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Síðani Ísrael sendi hermenn inn í Libanon, hava harðir bardagar verið millum ísraelska herin og Hizbollah, og báðir partar hava verið fyri mannfalli. Arabiskar sjónvarpsstøðir siga, at fýra ísraelskir hermenn fullu í gjár. Samstundis heldur ísraelska flogvápnið fram við at bumba mál í syðra parti av landinum og í Beirut, og í nátt skutu støðir hjá Hizbollah 32 rakettir inn í Ísrael.

Ein ísraelskur generalur sigur við blaði Maariv í dag, at herleiðslan umhugsar at víðka álopini á Libanon. Hann sigur, at tað fer at krevja, at herurin sendir boð eftir meiri fólki, og tað tulka summir eygleiðarar, sum at Ísrael umhugsar at gera veruliga innrás í Libanon og at herseta syðra part av landinum eina ferð enn. Sambært Maariv hevur Ísrael longu savnað fleiri túsund hermenn við libanska markið.

Avgerðin hjá Ísrael at senda hermenn inn í Libanon kann hava við sær, at libanski stjórnar-herurin kemur upp í bardagarnar. Libanski verjumálaráðharrin segði í gjárkvøldið, at ger Ísrael innrás í Libanon, fer stjórnarherurin at berjast saman við Hizbollah fyri at verja landið.

ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, heitti aftur í nátt á Ísrael og Hizbollah og bað teir semjast um vápnahvíld, men ísraelskir talsmenn hava sagt, at Ísrael fer ikki at helma í, fyrr enn Hizbollah letur teir báðar burturfluttu hermenninar aftur. Harafturat skal Hizbollah lata øll vápn frá sær.

# Vandi fyri kríggi á Afrikanska Horninum

**Etiopia hevur sent hermenn inn í Somalia, og tað kann enda við kríggi millum londini.**

KRÍGSVANDI
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Teir seinastu mánaðarnar hava víðgongdir islamistar tikið valdið í meginpartinum av Somalia. Somaliska stjórnin, sum fær stuðul frá ST, hevur nú bara ræði í býnum Baidoa, og í gjár sendi Etiopia hermenn inn um somaliska markið at forða fyri, at islamistarnir taka býin. Sambært AP stóðu islamistiskir hermenn beint uttan fyri býin, men valdu at taka seg aftur, tá teir etiopisku hermenninir komu hagar.

Islamistarnir hava kravt, at teir etiopisku hermenninir fara úr Somalia alt fyri eitt. Gera teir ikki tað, hótta islamistarnir við heilagum kríggi við Etiopia. Men tað ræðir ikki stjórnina í Etiopia. Kunningarmálaráðharri segði í gjár, at tann etiopiski herurin fer at jarðleggja islamistarnar, sum sambært USA hava tætt tilknýti til al-Qaeda og Taliban.

Næstovastin hjá islamistunum í Somalia, Sharif Sheik Ahmed, segði í morgun, at etiopiska uppíleggingin kann enda við kríggi. Eygleiðarar siga, at eitt kríggj í Somalia fer at líkjast tí, sum er hent í Irak og Afghanistan tey seinastu árini.